Fylgiskjal 4

Posteftirlitið

Uttanríkis og Vinnumálaráðið

Tórshavn 24. mai 2018
Journalnr.: 18/00156

**Hoyringssvar – Uppskot til løgtingslóg um einskiljing av P/F Postverk Føroya**

Viðmerkingar Posteftirlitsins til uppskot til løgtingslóg um einskiljing av P/F Postverk Føroya, dagfest 18. apríl 2018.

Løgtingslóg nr. 135 frá 18. oktober 2001 um postvirksemi(postvirksemislógin) fyriheldur seg ikki til felagsform ella eigaraskap hjá postvinnurekandi og teimum fyritøkum, ið veita postflutning. Um regulatorisku viðurskiftini ikki broytast við søluni av P/F Postverki Føroya, og rættindi og skyldur verða tær somu í 10 ár eftir søluna, er tað yvirskipaða metingin hjá Posteftirlitinum, at ein søla av felagnum sum útgangsstøði ikki hevur týdning í mun til skylduna hjá landinum at tryggja postflutning.

Í § 2 er sett inn heimild at seta sum treyt, at P/F Postverk Føroya skal halda fram við somu rættindum og skyldum 10 ár aftaná søluna, sum felagið hevur í dag sambært løgtingslóg um postvirksemi. Sambært postvirksemislógini § 8, er treyt í sambandi við veiting av konsessión, at konsessiónin skal verða avmarkað í tíð, umframt at virkisliga og staðarliga økið skal vera tilskilað. At ein konsessión verður galdandi í 10 ár, er ein broyting í praksis. At hava eina longri varandi konsessión, er vanliga gagnligt fyri eina vinnu, soleiðis at hon hevur støðugar karmar at virka undir. Hinvegin er postvirksemi ein vinna við ivasemi um framtíðina og mest sannlíkt við minkandi virksemi.

Parturin av virkseminum, ið er fevnt av postvirksemislógini, verður framhaldandi undir eftirliti av Posteftirlitinum, og hóast ætlanin er, at konsessiónin skal halda fram óbroytt í 10 ár fram. Um hildið verður fast í høvuðstreytunum í konsessiónini, er møguligt at onkrar ásetingar og treytir hava tørv á tillagingum, og tískil verður verður mælt til, at innihaldið í konsessiónini verður viðgjørt neyvari í sambandi við sølufyrreikingarnar, og Posteftirlitið er sjálvsagt til taks í tí arbeiðinum.

Vegna Posteftirlitið

Jógvan Thomsen
stjóri

/Súsanna Leo

Postal Authority, Skálatrøð 20, P. O. Box 73, FO 110 Tórshavn. Tel +298 35 60 20, Fax +298 35 60 35, www.posteftirlitid.fo